


*Í tøttum samstarvi millum eigararnar av P/F Kryvjing, formula.fo og NomaTek er nýggja kryvjivirkið í Klaksvík eitt rættiliga framkomið virkið.*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Kryvjing – eitt framkomið laksavirki

**Nýggja kryvjivirkið hjá East Salmon og Faroe Salmon í Klaksvík er í nógvar mátar eitt sera áhugavert virki. Í fyrsta lagi er talan um framkomna tøkni, sum stýrir flestu skipanum á virkinum, og í øðrum lagi er talan um fyrimyndarligt samstarv millum eigararnar av virkinum og tekniska partin, sum er formula.fo og NomaTek við fleiri undirleverandørum**

TØKNI
*Vilmund Jacobsen*

Jákup Magnussen, sum starvast hjá NomaTek, sigur, at tað hevur verið ógvuliga áhugavert og avbjóðandi hjá formula.fo og NomaTek at samstarvað við eigararnar av P/F Kryvjing, tí hesir hava alla tíðina havt sínar meiningar um, hvussu tingini skulu gerast.

- Síðan hevur tað verið uppgávan hjá okkum, ið hava samstarvað um ymisku skipaninar og menningina annars, at finna fram til loysnirnar.

### Føroysk loysn

Jákup sigur, at formula.fo og NomaTek hava leverað allan útbúnaðin til kryvjivirkið – heilt frá bryggjukantinum, til vøran verður avskipað. Alt undantikið sjálvar bader-maskinurnar, sum kryvja og reinsa fiskin; hesar eru týskar og eru ikki við í leveransuni hjá føroysku feløgunum.

- Ein nokso stórur partur av útbúnaðinum er framleiddur á verkstaðnum hjá okkum, t.d. rustfríu kørini til blóðging og køling og lyftibondini.

Jákup vísir á, at nakrir útlendskir undirleverandørar sjálvsagt eru til ein part av útbúnaðinum, men alt er umbiðið, lutvíst framleitt og sett upp í neyvum samstarvi millum eigararnar av P/F Kryvjing, formula.fo og NomaTek.

- Parturin hjá formula.fo hevur í fyrsta lagi verið softwarurnar og ymisku stýringsskipaninar, umframt monteringar og installeringar av eitt nú pakkirobottinum og pakkiflokkaranum.

Hann sigur, at bæði pakkirobotturin, sum er jananskur, men programmeraður í Íslandi og pakkiflokkarin, sum Marel í Íslandi hevur gjørt, eru við í leveransuni hjá formula.fo og NomaTek.

- Fyri at menna tøknina á fiskivinnuøkinum og fáa hesa at virka eftir ætlan, hevur verið neyðugt við ógvuliga tøttum samstarvi millum okkum og formula.fo, sigur Jákup.

Vit kunnu skoyta uppí, at tveir aðrir pakkirobottar eru í landinum; annar á Suðurlaks, hin á Sørvágslaks, og her er tað burtur av formula.fo sum hevur fingið hesar í "sving".

### Frambrot

Eitt, sum sermerkir virkið hjá P/F Kryvjing, er báðir móttøkutangarnir, sum standa uttan fyri virkið. Hesir eru úr glasfipur, framleiddir í Noregi, men skrúvaðir saman í Føroyum.

- Eigararnir av virkinum ynsktu, at brunnbátarnir, sum flyta laksin til virkið, skuldu sleppa av við laksin – uttan at liggja við bryggjuna og bíða eftir, at fiskurin fyrst verður kruvdur so hvørt. Hetta eru fyrsta móttøkan, vit vita um, har fiskurin kemur livandi í land og gongur livandi í kørunum, til hann verður arbeiddur inni á virkinum.

Jákup sigur, at hvørt karið tekur umleið 380 rúmmetrar, og tað svarar til, at bæði kørini taka umleið 100 tons av fiski.

- Tískil kann brunnbáturin nú pumpa laksin livandi í land og fara avstað aftur eftir næstu lastini. Áður lá báturin og bíðaði, meðan laksurin varð kruvdur.

Hann vísir á, at ein iltskipan er sett upp til kørini, soleiðis at laksurin saktans kann pumpast upp ein leygardag og ganga livandi í kørunum til mánadag, tá ið hann verður arbeiddur inni á virkinum.

- Sjálvt um hetta er fyrsta skipanin av sínum slagi, sum vit vita um, vísir hon seg at rigga ógvuliga væl – og betur enn, vit í byrjanini tordu at rokna við, sigur Jákup.

### Smittuvandin

Eitt annað endamál við móttøkukørunum er eisini at umgangast sjúkur, nú óttin fyri eitt nú ILA er so stórur millum alarar.

- Vatnið, sum kemur við laksinum úr brunnbátinum, verður filtrerað og stálað, soleiðis at tað ikki er smittuberandi, tá ið tað fer útaftur. Neyðugt er tó at taka regluligar vatnroyndir fyri at tryggjar sær, at alt er í lagi, sigur Jákup.

Hann sigur, at skipanin við móttøkukørunum gevur virkinum møguleikar at bøta um raksturin, samstundis sum smittuvandin verður nógv minni.

- Eigararnir hava nevniliga lagt stóran dent á, at eingin smitta kemur frá nýggja kryvjivirkinum í Klaksvík.

Jákup Magnussen sigur at enda, at innkoyringartrupulleikarnir, sum altíð eru, tá ið tú fæst við nýggja og framkomna tøkni, eru nógv minni nú enn í byrjanini.

- Vit eru spentir uppá, hvussu alt fer at taka seg út, tá ið tíðin gongur, leggur hann aftrat.



*Nýggja kryvjivirkið í Klaksvík. Hetta eru fyrstu móttøkutangarnir av sínum slagi, sum menn vita um. Her gongur fiskurin livandi, til hann verður arbeiddur inni á virkinum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Lagkøka, kakao og skuggaleikur á dagstovninum við Gøtugjógv

**Dagstovnurin við Gøtugjógv fyllir trý ár leygardagin. Dagurin verður hildin mánadagin komandi**

BØRN
*Vilmund Jacobsen*

**Gøtugjógv:** Leygardagin, 1. februar, fyllir dagstovnurin við Gøtugjógv trý ár. Dagurin verður hildin mánadagin, 3. februar, við lagkøku, kakao og einum leiki, sum ein pedagognæmingur framførir. Hetta er ein sonevndur skuggaleikur, har skuggar av Brúsabukkunum verða vístir á lørift.

Torgerð Hansen er leiðari á dagstovninum við Gøtugjógv.

Hon sigur, at hóast stovnurin er ungur í garði, plaga tey at "markera" føðingardagin

við onkrum etandi og drekkandi, og hesaferð verður so leikurin eisini á skránni.

- Fyri at øll kunnu verða við - bæði tey, sum eru fyrrapart og tey, sum koma seinnapart – verður lagkøka og kakao at fáa um 12.30 tíðina mánadagin. Vit hava eisini sent kunningarskriv til foreldrini, har tey verða boðin til ein drekkamunn. Foreldrini kunnu koma, soleiðis sum tað passar teimum hendan dagin. Teimum nýtist tískil ikki at møta upp stundisliga kl. 12.30.

Torgerð sigur, at tey fara at syngja einar tveir sangir saman við børnunum, áðrenn leikurin verður sýndur.



*Kommunali dagstovnurin við Gøtugjógv hevur trý ár á baki leygardagin. Stovnurin er býttur upp í vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla. - Her gongur væl, sigur Torgerð Hansen, leiðari.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### 76 pláss

Hon sigur, at dagstovnurin við Gøtugjógv, sum bæði hevur vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla, hevur pláss til 76 børn, og alt er uppfylt.

Samlaða starvsfólkatalið er 20, harav nøkur arbeiða niðursetta tíð.

- Talið av ársverkum liggur um 14, sigur Torgerð.

Børnini í kommunala dagstovninum við Gøtugjógv eru úr 0 árum til og við børn í 1. flokki, sum ganga í frítíðarskúla.

- Her gongur væl, og vit hava havt nóg mikið av pedagogum. Pedagogarnir eru sjey í tali; hini eru hjálparfólk. Vit hava júst lýst eftir einum pedagogi aftrat, men hesaferð fingu vit ongan, sigur Torgerð Hansen.

# Droymir um eina ferð til USA

UNGDÓMUR
*Vilmund Jacobsen*

Blaðskrivstovan hjá Sosialinum í Saltangará hevur havt sín fyrsta starvsnæming. Tað er 15 ára gamla, Beinta Anthoniussen, sum býr Undir Nesinum á Toftum. Hon er dóttir, Tóru og Eyðun Anthoniussen. Beinta gongur í Tofta skúla. Tey eru 18 næmingar í flokkinum, 11 dreingir og sjey gentur. Flokslærari er Asbjørn Vang.

Á Sosialinum hevur Beinta tikið sær av ymiskum. Hon hevur skrivað greinir, sum hava verið at sæð í blaðnum, og hon hevur eisini roynt at sitið einsamøll á skrivstovuni og tikið telefonina, samstundis sum hon hevur ført tekst inn á teldu.

Hetta er fyrstu ferð, Beinta er í starvsvenjing.



*Beinta Anthoniussen hevur seinastu tvær vikurnar verið í starvsvenjing á blaðskrivstovuni hjá Sosialinum í Saltangará.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Droymir um USA

Tá ið hon er liðug við 10. flokk um hálvt annað ár, hugsar hon um at gera eina ferð saman við eini vinkonu til USA. Um nakað spyrst burtur úr hesi ferðini, tá ið tann tíðin kemur, er ov tíðliga at siga nakað um enn.

- Hetta er mín dreymur, sigur hon.

Men Beinta hugsar eisini um tær hendingar, sum vit hoyra um úr USA, har skúlanæmingar eru skotnir.

- Hetta ræðir meg eitt sindur, sigur hon.

### Løgreglumaður

Spurd, hvat arbeiði, hon kundi hugsað sær, tá ið hon einaferð fer út á arbeiðsmarknaðin, sigur hon:

- Eg kundi hugsað mær at lært til løgreglumann.

Sosialurin ynskir Beintu góða eydnu og takkar fyri tíðina á skrivstovuni.

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Citroen Saxo 1,5D 3h
km. 120.000, grønur, jul'97
80.000,-
Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 163.000, grønur, mai'97
85.000,-
Citroen Xsara 2.0 HDI
km. 95.000, gráur, nov'99
120.000,-
Citroen Xsara 1.9 td week
km. 77.000, gráur, okt'98
115.000,-
Suzuki Baleno 1.3i
km. 27.500, gráur, apr'00
99.000,-
Citroen Saxo 1.5D 3d
km. 44.000, gráur, jan'01
99.000,-
Citroen Xsara 1.9td
km. 110.000, reyður, aug'98
115.000,-
Toyota Corolla 1.3i
km. 24.000, svartur, feb'02
103.000,-
VØRUVOGNAR
Citroen Jumper 2,5TD
km. 120.000, reyður, 1996
120.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai'97
88.000,-
Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai'97
88.000,-
Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

